# TILTØK

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærararaíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Hjartafelagið**
Postboks 3120, 110 Tórshavn
e-mail:
hjartafelag@hotmail.com

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Føroyskir Mærsk Siglarar**
*Postboks 11, 490 Strendur*
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Meira fæst at vita, við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Amnesty International Føroya Deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 9.00 til 17.00 og mikudag frá kl. 9.00 til 16.00
Heimasíða: www.amnesty.fo
Teldupostur:
amnesty@amnesty.fo

## Brúdleyp

Leygardagin 25. juni *giftust* í Singapore Ivan í Lág, Strendur og Sharon Rose, Singapore. Veitslan verður í HB-húsinum 27. juli kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 314067 ella 448342 áðrenn 10. juli.

Leygardagin 25. juni *giftust* í London Óli Mortensen, Tórshavn, og Alice Bolly, París.

Leygardagin 2 juli kl. 15.00 giftast í Sjóvar Kirkju Sunfríð Berg Jacobsen, Skála og Alexandur Johansen, Strendur. Veitslan verður hildin í Ítróttarhøllini á Skála kl. 19.30.

Leygardagin 2. juli kl. 13.00 giftast í Frederiksberg Kirke, Frederiksberg Allé 65, Sjúrður Egholm Hansen, Sørvágur, og Tatiana Goldberg, Frederiksberg. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, eru vælkomin til móttøku á Valløvej 10, 2700 Brønshøj, eftir vígsluna. Veitsla fyri innbodnum verður á Restaurant Lynetten, Refshalevej 200, DK-1432 København K, kl. 18.00.

Leygardagin 2. juli giftast í Hvidovre Kirke Bjørg Poulsen, av Argjum, dóttir Ragnu og Mariel, og Bjarni Johansen, úr Havn, sonur Sonju og Kjartan. Brúdleypsveitsla verður fyri innbodnum í TIB´s Forbundshus. Opið hús verður dagin eftir, sunnudagin 3. juli kl. 16.00, heima hjá brúðarparinum á Forsvarsvej 4 í Herlev, har vinir og kenningar eru vælkomin í brúðarhús.

Leygardagin 2. juli kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni, Margaret Ludvig og Heri Kjelnæs, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 2. juli kl. 16.00 giftast í Lindevang kirke Birita Haldansen, Vestmanna og David Santana, Frederiksberg. Veigslan verdur hildin fyri innbodnum á Hansens Køkken & Bar, Frederiksberg Allé 11, 1621 Kbh. V

Hósdagin 7. juli kl. 14.30 giftast í Kollafjarðar kirkju Anja Zachariasen, Streymnes, og Dan Jacobsen, Kollafirði. Døgurið verður fyri innbodnum. Kl. 20.30 verður opið hús í Bygdarhúsinum í Hósvík. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 9. juli kl. 13.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Karina Lassen og Gimmi Olsen. Eftir vígsluna og fram til kl. 18 eru øll hjartaliga vælkomin í KFUM & K at heilsa upp á brúðarparið.

Leygardagin 9. juli kl. 14.00 giftast í Ebenezer Astrid Gerhardsdóttir Tróndheim, Klaksvík og Ragnar Mouritsen, Hoyvík. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00.

Leygardagin 9. juli kl.15.00 giftast í Vestmanna kirkju Jastrid McGavin, Tórshavn, og Háldan Haldansen, Vestmanna. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 9. juli kl. 16.00 giftast í Tvøroyri kirkju Ritha Holm, Hvalba og Eyðun Midjord, Lopra. Veitslan verður fyri innbodnum í Royn-høllini kl. 19.00.

Leygardagin 9. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Fríða Signarsdóttir Poulsen og Kári Annand Berg, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 19.00.

Leygardagin 9. juli kl.17.00 giftast í Dómkirkjuni Elin Michelsen, Tórshavn, og Símun Eliasen, Fuglafirði. Veitslan verður fyri innbodnum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 19.00.

Fríggjadagin tann 15. juli kl. 14.00 giftast í Sørvágs kirkju Tórfríð Davidsen, Sørvágur og Dánjal Tavsen, Sørvágur. Døgurði verður fyri innbodnum í Missiónshúsinum Libanon. Vælkomst verður í Sørvágs Bio kl. 20.00.

Leygardagin 16. juli kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Mia Krog Elisdóttir av Sandi og Steen Hjartan Sørensen úr Trongisvági. Veitslan verður fyri innbodnum í høllini í Trongisvági kl. 19.00.

Leygardagin 16. juli kl. 10.00 giftast Rúna á Rógvi Simonsen, Vestmanna, og Jákup Olaf Thomassen, Sandavágur, í Sandavágs kirkju. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, eru vælkomin til náttúrða og køkur í ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00.

Leygardagin 16. juli kl. 13.00 giftast í Berøa, Saltangará Linda Højgaard, Saltangará og Godwin Sunder Edwin, Mysore, India. Døgurði verður fyri innbodnum á Sjókaféini í Runavík og opið hús verður eisini á Sjókaféini frá kl. 20.00.

Leygardagin 16. juli klokkan 15 giftast í Havnar Kirkju, Jóna G. Jacobsen úr Hvalba og Poul Laust Christiansen av Argjum. Um kvøldið verður náttúrði fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum.

Leygardagin 16. juli kl. 12.00 giftast í Nebo á Toftum Bodil Rasmussen, Toftir ogt Levi á Torkilsheyggi, Nes. Døgurði verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík, kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá á tlf. 223511, 213512 ella 447111, 447404 innan 7. juli.

Leygardagin tann 16. juli giftast í Eiðis kirkju Joan Durhuus Kruse, Eiði og Hans Jákup Drangastein Johansen, Haldórsvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í EB-húsinum á Eiði kl. 19.30. Tey ið vilja gleða brúðarparið við at koma vera biðin um at siga frá á tlf. 423569 ella á 226699. innan 2. juli.

22. juli kl. 17.00 giftast í Nólsoyar kirkju Anne Mette Greve Klemensen úr Rødding og Leif Hansen úr Nólsoy. Eftir vígsluna verður vælkomst á Alistøðini. Tey ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin at siga frá á tlf. 327061 ella 327002 ella á annemette@mpiri.org innan 10. juli.

23. juli kl. 17.00 giftast í Dómkirkjuni Joan Joensen, Tórshavn, og Jens Jakob Nissen, Søborg. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Súsanna Gaard, Klaksvík, og Ólavur S. Hansen, Norðoyri. Veitslan verður fyri innbodnum í kantinuni á Kósini kl. 18.30.

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Anna Elisabeth Joensen av Tvøroyri og Sámal Jákup Gøte úr Leirvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at ringja og boða frá áðrenn 9. juli á tlf. 322308 ella 220020. Eisini ber til at skriva til Goete@kallnet.fo

Leygardagin 30 juli. giftast í Betania í Skopun kl. 14.00. Davia Gertrud Nicolajsen, Skopun og Hans Jacob Reinert Petersen, Saltnes. Tey ið vilja gleðast saman við okkum, eru vælkomin inn á gólvið hjá Arndis og Jógvan Hendrik Nicolajsen, Skopun, frá kl. 19.00.

Leygardagin 30. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju, Winnie Tausen, Hov og Søren Poulsen, Nólsoy. Veitslan verður í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317802 ella 222428 innan 10. juli.

Leygardagin 30. juli kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Eva Gunnarsdóttir Petersen og Bjarki Joensen, bæði búsitandi í Keypmannahavn. Veitsla verður hildin í Ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 18.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 14. juli á tlf. 581467.

Leygardagin 6. august kl. 13.00 giftast í Kaldbak Sólmei Eydna Rasmussen, Kaldbak og Finn Nolsøe, Kaldbak. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 311999 ella 316797.

Leygardagin 13. august kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni, Rannvá Lind Helgadóttir, Vestmanna og Borgar Hansen, Nes. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19:00. Tey í vilja gleða brúðarparið við koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449988, 424511, 584430 ella 504040.

Leygardagin 20. august kl. 14.00 giftast í Kollafjarðar kirkju, Marin Tórhalla Luid úr Miðvági og Esmar Elias Sofus Petersen, Kollafjørður. Veitslan verður í Bygdarhúsinumí Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum vera biðin um at siga frá í seinasta lagi 8. august á tlf. 581614, 421150, ella 333312.

## Silvurbrúdleyp

5. juli kunnu hjúnini Joan og Tage Jørgensen, Sørvágur, halda silvurbrúdleyp. Veitslan verður í Sørvágs Bio 9. juli kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið, verða biðin um at ringja tlf. 266018/332326 ella 333663 áðrenn 1. juli.

Týsdagin 26. juli, hava Ása og Kári Olsen silvurbrúdleyp. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma til borðhaldið, sum verður hildið á Læraraskúlanum sama kvøldið, kunnu boðað frá á tlf. 31 65 85 - 21 65 85 og 51 65 85.

Týsdagin 9. august kunnu hjúnini Eydna og Bartal Kass, Argir halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 13. august kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið eru vælkomin í neystið - har borðreitt verður við stóra kalda borðinum - og verða vinarliga biðin um at boðað frá á tlf. 31 64 56 ella á tlf. 22 13 10 innan 1. august.